# Hotel Føroyar yvirtekur Áarstovu

**Fyrsta februar yvirtekur Hotel Føroyar samtakið Áarstovu. Gunndur Fossdal verður leiðari, og hann sigur, at teir nú hava eitt fullkomið konsept í samtakinum.**

Leo Poulsen

– Við Áarstovu fáa vit eitt fullkomið konsept innan matstovuyrkið.

Tað staðfestir matstovuleiðarin í Hotel Føroyar samtakinum, Gunndur Fossdal.

Teir hava framman undan Gourmet matstovuna á Hotel Føroyum, Brasserie á Hvonn og sushi á Etika.

– Nú fáa vit so tað heimligu, hugnaligu matstovuna í Áarstovu. Hølini eru serstakliga hugnalig og liggja ógvuliga væl fyri. Tú kanst næstan siga, at Áarstova er portrið til Havnina, sigur Gunndur Fossdal.

Hann sigur, at tey hava nógv og dugnalig starvsfólk, og hetta fara tey at gera sær dælt av.

– Áarstova verður tað hugnaliga matstaðið, eitt sindur øðrvísi enn heima, men við heimligum hugna. Vit fara at leggja dent á at fáa hendur á so nógvari føroyskari ráværu sum gjørligt, men annars verður tað klassiskur matur við nýhugsan, sigur Gunndur Fossdal.

Matstovan verður opin frá 18 og út til umleið 22 á vetri, men um summarið verður eisini opið á døgurða.




*Gunndur Fossdal framman fyri Áarstovu, sum Hotel Føroyar yvirtekur raksturin av 1. februar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 33.000 krónur til Krabbameinsfelagið

**10. flokkur í Vestmanna skúla handaði í morgun Krabbameinsfelagnum ein kekk áljóðandi 33.245,50 krónur sum er úrslitið av einari felags verkætlan.**

Leo Poulsen

Á hvørjum ári skipar 10. flokkur í Vestmanna fyri einari verkætlan, har latið verður upp til flokkin at gera av, hvat arbeitt verður við. Og í ár varð gjørt av at talan skuldi vera um eina felags verkætlan.

– Vit hildu, at Krabbameinsfelagið arbeiðir við einari góðari sak, og tað var meiriluti fyri, at gera eina innsavning, har peningurin skuldi fara til hendan sjálvbodna felagsskapin. Vit kenna øll onkran, sum er raktur av sjúkuni, sigur Bjartur Isaksen.

Tað eru 14 dagar síðani, at verkætlanin tók form, og í síðstu viku var skipað fyri einari tónleikacafé í Vestmanna, har ymiskt varð selt, og eisini skipaði flokkurin fyri tombola.

– Har vóru tónleikaframførslur og listaframsýning, og so hava vit eisini skipað fyri tveimum tombola og einum barnadiskoteki, sigur Bjartur Isaksen.



*Bjartur Isaksen handaði formanninum í Krabbameinsfelagnum, Jákup N. Olsen, ein kekk áljóðandi 31.245,50, og umframt tað koma 2.000 krónur so samlaða gávan er 33.245,50*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Kennist væl

Innsavningin hevur gingið ógvuliga væl.

– Allarflestu støð, ið vit vitjaðu, vóru til reiðar at rætta eina hjálpandi hond, og tað var ógvuliga fáa staðni, har tey ikki fingu hjálpt, sigur Jákup Djurhuus Kjærbæk.

Hesaferð var verkætlanin ein felags verkætlan, men tað er tað kortini ikki neyðturviliga á hvørjum ári.

– Hesaferð gjørdist tað so til eina felags verkætlan, og vit velja sjálvi hvat vit vilja arbeiða við, sigur Jákup Djurhuus Kjærbæk.

10. flokkurin er sjálvandi vælnøgdur við at hava savnað so nógvan pening inn til eitt so týdningarmikið arbeiði, sum Krabbameinsfelagið ger.

– Tað kennist ógvuliga væl, eru teir báðir, Bjartur Isaksen og Jákup Djurhuus Kærbæk samdir um.

## Nógvir pengar

Í morgun kundi 10. flokkur so handa formanninum í Krabbameinsfelagnum, Jákup N. Olsen, ein kekk áljóðandi 33.245,50, sum er úrslitið av peningainnsavnanini.

Formaðurin var sum vera man fegin um hesa óvæntaðu hjálpina og segði, at felagið hevur ovmikið av uppgávum at nýta peningin til, og nýtti eisini høvið at takka Vestmanna skúla og 10. flokki fyri stórfingnu gávuna.

– Fyrst og fremst vil eg takka 10. flokki í Vestmanna skúla fyri at hava valt Krabbameinsfelagið. Tað vísir, at tey seta prís upp á tað arbeiði, vit gera, samstundis sum eg eisini fegnist um, at tað eru ung fólk, sum seta fokus á krabbamein. So vit eru stak fegin um, at tey hava hugsað um okkum, sigur Jákup N. Olsen.

Hann vísti á, at Krabbameinsfelagið er ein sjálvboðin felagsskapur, sum ikki fær nakran almennan stuðul, og tí eru slíkar gávur sera væl komnar.

– Vit hava í løtuni eini 40 fólk, sum arbeiða sjálvboðin hjá okkum, umframt tvey, sum eru professionelt knýtt at felagnum, so slíkar peningagávur eru ótrúliga væl komnar, sigur Jákup N. Olsen.